Søkt verður eftir SSP-ráðgeva at byrja 1. februar 2010 ella eftir nærri avtalu.

Starvið sum SSP-ráðgevi er eitt spennadi starv við nógvum avbjóðingum, har viðkomandi skal menna SSP-skipanina og samskipa SSP-arbeiðið.

- at vera sambindingarlið millum leiðslubólk, samskipanarbólk og arbeiðið í økjunum kring landið
- at ráðgeva og vegleiða bæði skúlum og stovnum um fyribyrgingararbeiði
- at skipa fyri undirvísing og upplýsing fyri børnum, ungfólki, foreldrum og øðrum í sambandi við fyribyrgjandi átøk
- at standa á odda fyri fakligari og námsfrøðiligari menning í sambandi við útgreiningar, átøk og nýhugsan um fyribyrging

er tað ein fyrimunur, at viðkomandi hevur kunnleika til økið og royndir innan ráðgeving og fyribyrgjandi arbeiði millum børn og ung.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir verða sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Væntast kann, at starvið krevur nakað av ferðing bæði í Føroyum og uttanlands. Partur av arbeiðinum verður uttan fyri vanliga arbeiðstíð.



# SSP-ráðgevi

**Um starvið**
SSP-ráðgevin skal bæði virka sum sambindingar- og samskipanarlið millum myndugleikarnar og arbeiðið í økjunum at fyribyrgja kriminaliteti og niðurbrótandi atburði millum børn og ung. Eisini skal ráðgevin skipa fyri arbeiðinum at byggja upp eina ráðgevingartænastu innan SSP.

Endamálið við SSP-arbeiðinum er at fyribyrgja kriminaliteti millum børn og ung og at hjálpa teimum, ið hava framt kriminalitet, ella sum eru í hesum vandabólki, at koma burtur úr aftur tí truplu støðu, tey eru í við atliti at m.ø. harðskapi, rúsevnum, lógarbrotum, óhóskandi og niðurbrótandi atburði.

**Høvuðsuppgávur hjá SSP-ráðgevanum eru:**

- at samskipa SSP-arbeiðið
- at menna hugskot til fyribyrgjandi arbeiði

**Vit vænta, at viðkomandi:**

- hevur eldhuga, orku og áræði at standa á odda fyri at fáa SSP-arbeiðið í Føroyum at virka
- dugir at seta í verk kanningararbeiði og leiða verkætlanir
- dugir væl at samstarva og skapa virðing fyri arbeiðinum
- hevur hugsjónir um fyribyrgjandi arbeiði og menningarmøguleikar innan økið.

**Vit bjóða**
Eitt sera spennandi starv við nógvum ymiskum uppgávum og góðum møguleikum fyri fakligari og persónligari menning.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari kann hava eina fakliga útbúgving sum t.d. sosialráðgevi, lærari, løgreglufólk ella aðra viðkomandi útbúgving. Harumframt

SSP-ráðgevin starvast á Barnaverndarstovu Føroya saman við sálarfrøðingi, sosialráðgeva og skrivara.

**Umsókn**
Umsókn saman við avriti av prógvi, skeiðsváttanum, frágreiðing um arbeiðsroyndir og møguligum viðmælum skal verða Barnaverndarstovu Føroya í hendi í seinasta lagi 21. desember 2009 kl. 12.00.

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja til Barnaverndarstovu Føroya, Oddbjørg Balle, leiðara, tlf. 30 24 95.

**Umsóknin verður stílað til:**
Barnaverndarstovu Føroya
R.C. Effersøesgøtu 30
100 Tórshavn
Ella sum teldubræv: ob@bvs.fo

**SSP** – skúli, sosialir myndugleikar og politi

Sosialurin
...altíð við tí nýggjasta

**Tekna hald NÚ**

kr. 495,-
um ársfjórðingin

Spar 560,- í mun til leysasølu

**Ja takk!** Eg ynski at tekna meg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið borið út 5 ferðir um vikuna

Verður sent ópostað. Sosialurin rindar postgjaldið
64

Navn:
Bústaður:
Bygd / býur:
Telefon:
Undirskrift:

**Send lepan til:** Sosialurin · Boks 76 · FO-110 Tórshavn

